Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Dagfinn Olsen, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Rúnar Reistrup, Dia Midjord, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Vantandi samsvar

## *Oddagrein*

VIT sóu fyrr í ár, hvussu Høgni Hoydal varaløgmaður skákaði sær undan í flóttafólkamálinum, tí vit føroyingar sambært honum ikki høvdu heimild til nakað sum helst í tí málinum. Nú síggja vit, at sami Høgni Hoydal stendur aftanfyri politiskt litað brøv til ST og saman við restina av samgonguni vil sleppa at tosa við NATO aðalskrivaran.

EIN spyr seg næstan um vit hava loyst, nú heimildirnar sum Høgni Hoydal tilleggur okkum føroyingum eftir øllum at døma eru víðkaðar so radikalt uppá fáar mánaðar. Um so er, at himildirnar ikki eru víðkaðar síðani flóttarfólkamálið, so er væntandi samstar millum tað, ið Høgni Hoydal segði í samband við flóttafólkamálið og tað, ið samgongan nú ger. Við øðrum orðum líkist hettar politiskari opportunismu.

UPPLÝSINGAR um ST viðtøkur o.s.fr. kann hvør heimsborgari fáa fatur í – eisini Føroya Landsstýri. At skriva til ST at danska stjórnin tykist ikki vísa veruligan vilja til at samráðast hóast landsstýrið var væl fyrireikað og hevur ein »considerable« meiriluta aftanfyri seg í Løgtinginum, kann ikki skiljast sum annað enn eitt politiskt bræv, ið ivaleyst ongantíð átti at verið sent. Fyri tað fyrsta er tað bert búskaparliga skiftistíðin, ið skilir partarnar, fyri tað næsta hevur tað víst eg, at Føroya Landsstýri ikki var so serstakliga væl fyrireikað til hesar samráðingarnar, sum teir sjálvir vilja vera við – ikki framúr lítillátið av umsitingini at skriva slíkt –og fyri tað triðja kann tað diskuteerast, um meirilutin í Løgtinginum er »considerable«, sum rættiliga tendensiøst verður sagt í brævinum.

SPURNINGURIN er, um Føroya Landsstýri við sínum politiskt litaða brævi, ikki hevur givið eina mynd av føroyingum sum eina sjálvrættvísa og forkelaða tjóð. Fyri at seta tingini í perspektiv, so kann nevnast, at sjálvt fyriuttan blokkstuðul eru Føroyar ríkari enn á leið 90% av ST limalondunum.

TAÐ tykist næstan sum um, at nú tá tað er greitt, at meirilutin av Føroya fólki ikki tekur undir við fullveldisætlanini hjá samgonguni, so roynir Landsstýrið at elva til rok millum Danmark og Føroyar sum seinast aútveg at fáa loysingina. Ella kanska er ætlanin at fáa valagn, nú samgonguskeiðið er meira enn hálvrunnið uttan stórvegis avrik.

VÆNTANDI samsvar millum gerðir varaløgmans og seinastu tiltøkini hjá samgonguni, boða ikki frá góðum viðvíkjandi standinum í demokratiska samfelagnum Føroyum. Hví er løgtingsins uttanlandanevnd ikki fráboðað í ST málinum og ikki minst í NATO málinum? Formaðurin íuttanlandanevnd løgtingsins sigur, at ST málið varð viðgjørt á nevndarfundum í Keypmannahavn herfyri. Um so er, at málið er viðgjørt, so stendur tað ivaleyst væl og virðiliga lýst í fundarreferatum frá hesum fundum.

TAÐ týdningarmesta í NATO málinum er ikki, um teir sleppa at tosa við NATO ella ikki. Vit, og óivað eisini løgtingslimir, kundu sera væl hugsað okkum at vitað, hvat Føroya Landsstýri ætlar at tosa við NATO um. Vónandi ganga teir ikki og fortelja, at vit fara at gerast fullveldi í næstu framtíð, tí tað er ivasamt, sum landið liggur, og mannminkandi er at fara afturumaftur.

***Sosialurin***

# Alt fær ein enda

*Í døgurðatímanum í gjár læs kvívikingurin Ivar Iversen tíðindini í útvarpinum. Hann hevði eisini 40 ára starvsdag og fer nú frá*



*Kl. 12.20 í gjár las Ívar Iversen tíðindini í útvarpinum fyri seinastu ferð. Samstundis hevði hann 40 ára starvsdag* *Mynd: Jens K. Vang*

JÚSTINUS LEIVSSON EIDESGAARD

Hann hevur brent eitt sindur hásu røddina so fast inn í tilvitskuna á føroyinginum, at hon er eins týðilig og røddin á okkara foreldrum. Fólk um miðjan aldur hava hoyrt hann so at siga hvønn dag í útvarpinum, alt tey kunnu minnast og Ívar er eins heimligur og húsfólk hjá nærum hvørjum mannsbarnið í Føroyum.

-Men alt fær jú ein enda og soleiðis er eisini hjá mær. At arbeiða í útvarpinum er vani og tað verður saknur hjá mær ikki at fara til arbeiðis. Eg við taka ein dag í senn og veit ikki rættuliga hvat eg skal fáa tíðina at ganga við, sigur Ívar Iversen.

Ívar Iversen er ættaður í Kvívík, men hevur búð meginpartin av ævini í Havn. Sum ungur fór hann til skips og tók útbúgving sum fjarritari. Hann sigldi sum fjarritari í fleiri ár.

Í útvarpinum hevur hann verið fastur upplesari og hann hevur eisini syrgt serstakliga fyri útlendskum tíðindum í mong ár.

Ívar er málvinur sum fáur, og hann hevur verið góður í ráðum hjá mongum tíðindamanni. Onki er at ivast í, at Ívar fer at fáa tíðina at ganga. Hann hevur stóran áhuga fyri samfelagnum og dámar væl at vera upp í seyðahaldi og tá menn røða um mentan annars. Ívar er eisini musikalskur og spælir urgu í kirkjum, tá boð eru eftir honum.

# Íslendsk trygdarskipan fyri smærri útróðrarbátar

**Soleiðis sum føroyski skipaflotin er samansettur, hevði fyrimunur verið av at brúkt íslendsku skipanina fyri fiskiskip, ið er sera væl útbygd og nútímans, ikki minst tá ræður um smærri skip, verður mælt til í álitinum um yvirtøku av Skipaeftirlitinum**

ÓLAVUR Í BEITI

Í tilmælinum frá nevndini, sum hevur latið fiskimálaráðharranum álit við tí endamáli at fremja samtyktirnar um yvirtøku av skipaeftirlitinum sum sermál og seta neyðuga lóggávu í verk í hesum sambandi, mælir nevndin til, at samráðingar verða tiknar upp við donsku stjórnina um yvirtøkuna og møguligar treytir, soleiðis sum roknað varð við í 1988 og 1998. Undir hesum samráðingum kann landsstýrið vísa til frágreiðingina og lógaruppskotið sum prógv um ætlanir landsstýrisins fyri føroyskari lóggávu og umsiting av økinum eftir yvirtøkuna.

– Greiða eigur at verða fingin á, um landsstýrið ynskir at yvirtaka málsøkini vitaverk, veðurtænastu og farvatnsuppmerking, ella um stjórnin krevur at tey verða yvirtikin saman við skipaeftirlitinum.

– Spurningurin um føroyska umboðan í IMO eigur at verða loystur í sambandi við yvirtøkuna, tilmælir nevndin.

### Sjóvinnufyrisitingin

Og víðari verður tilmælt, at eftir loknar samráðingar verður lógaruppskotið end-urskoðað um neyðugt og lagt fyri løgtingið, eftir at tað hevur verið sent til hoyringar hjá viðkomandi myndugleikum, felagsskapum og vinnuumboðum.

– Málsøkið verður umsitið av Sjóvinnufyrisitingini, ið verður skipað sum sjálvstøðug fyrisiting undir landsstýrismanninum í sjóvinnumálum. Avtalur verða gjørdar við donsku og íslendsku fyrisitingarnar um skipan og viðlíkahald av regluverkinum.

### Egineftirlitsskipan

Hví vit skulu gera avtalur við donsku og íslendsku fyrisitingarnar grundgevur nevndin fyri, og sigur, at við tað at farma- og ferðamannaskip eru nógv tann týdningarmesti parturin av danska skipaflotanum og fiskiskip bert ein heilt lítil partur, er danska eftirlitsskipanin fyri fiskiskip minni útbygd enn fyri hini skipasløgini. Í Íslandi er støðan júst tann øvugta, svarandi til størra týdningin av fiskiskipum.

– Soleiðis sum føroyski skipaflotin er samansettur, hevði fyrimunur verið av at brúkt íslendsku skipanina fyri fiskiskip, ið er sera væl útbygd og nútímans, ikki minst tá ræður um smærri skip. Hinvegin er danska regluverkið fyri onnur skipasløg betri útbygt enn tað íslendska og sostatt betri hóskandi sum grundarlag undir einum føroyskum regluverki fyri onnur skip enn fiskiskip.

– Íslendska trygdarskip-anin fyri smærri útróðrabátar er serliga áhugaverd, tá hugsað verður um, at lítið og einki eftirlit er við hesum bátum í dag. Varð hendan skipanin sett í verk í Føroyum við møguligum tillagingum, hevði borið til at gjørt tað líðandi. Byrjað kundi verið við einari egineftirlitsskipan, har eigarin sendir inn oyðublað til Sjóvinnufyrisitingina við upplýsingum um trygdarstøðuna. Eftirlitið kundi verið skipað í samstarvi við Fiskiveiðieftirlitið, tá stovnurin sum nú er hevur eftirlit við opnum bátum sambært lógini um bjargingarútgerð á opnum bátum, sigur nevndin í álitinum.

## Tingfundur týsdagin

*Týsdagin 19. september kl. 13.30 verður tingfundur aftur*

Á skránni fyri komandi tingfund skulu tríggir fyrispurningar svarast. Mamy Dahl Sørensen, løgtingslimur, hevur spurt um samferðsluviðurskiftini í Kalsoynni. Lisbeth L. Petersen, løgtingslimur, hevur spurt um setan av nevnd at leggja til rættis tiltøk fyri at økja lut kvinnunnar í politisku støðutakanini, og Flemming Mikkelsen, løgtingslimur, hevur spurt um vegagerðina Øravík – Hov og nýggja samferðsluhavn á Tvøroyri.



# Aðalskrivarin góðkent uppritið

*Loyniliga uppritið, sum bretskur serfrøðingur skrivaði um verjupolitikkin hjá fullveldinum Føroyar, er góðkent og viðmælt av aðalskrivaranum í NATO parlamentinum*

JOHN JOHANNESSEN
EYÐUN KLAKSTEIN

NATO hevur bæði góðkent og viðmælt uppritið frá bretska professaranum, Michael Clarke, sum staðfestir, at Føroyar ikki tørva at hava her fyri at gerast limir í Partnership for Peace, sum er ein felagsskapur undir NATO.

Tað er sjálvur aðalskrivarin í NATO parlamentinum, ið hevur viðmælt uppritið.

Hetta staðfestir umsitingin í Tinganesi eftir at Sosialurin hevur biðið um at fáa nærri innlit í arbeiðið kring uppritið frá Michael Clarke, professara.

Viðmælið styrkir um frágreiðingina frá Michael Clarke og staðfestir, at upplýsingarnar frá danska uttanríkisráðharranum til landsstýrið um, at Føroyar mugu hava vápnaða megi fyri at gerast limir, eru skeivar.

Báðir teir føroysku fólkatingslimirnir, Óli Breckmann og Jóannes Eidesgaard, hava sett Niels Helveg Pedersen, uttanríkisráðharra, skrivligan fyrispurning um málið.

Tað hevur ljóðað, at landsstýrið hevur fingið tríggjar frágreiðingar frá trimum ymiskum serfrøðingum um verjuna av fullveldinum Føroyar, men hetta avvísir uttanlandsdeildin hjá Løgmansskrivstovuni.

# Játtanirnar til kirkjurnar viðgjørdar



*Tær fíggjarætlanirnar, próstadømisráðið hevur skert, eru tær hjá nøkrum av teimum størru kirkjunum*

*Nýggja próstadømisráðið er liðugt at viðgera fíggjarætlanirnar hjá teimum 60 kirkjunum í Føroyum. Í nøkrum førum var neyðugt at skerja*

JOHN JOHANNESSEN

Tað eru ikki longur einstaku kirkjuráðini, sum við lokala kirkjuskattinum gera av sínar egnu fíggjarkarmar.

Nýggja kirkjulógin, sum kom í gildi 1. januar í ár, ásetir sama kirkjuskatt fyri alt landið.

Síðani skulu einstaku kirkjuráðini gera eina fíggjarætlan, sum tey senda dómpróstaráðnum at góðkenna.

Próstadømisráðið metir síðani út frá samlaðu puljuni av kirkjuskatti, sum kann vera í mesta lagi 0,3 prosent av samlaða landsskattinum, um kirkjurnar kunnu fáa tann pening, fíggjarætlanirnar hjá kirkjuráðunum krevja.

### Skert størru kirkjurnar

Samlaða grundarlagið til fíggjarætlanirnar hjá kirkjunum er 13 milliónir krónur. Hetta skal býtast millum 60 kirkjur.

Tí er neyðugt at skerja fíggjarætlanirnar hjá nøkrum av kirkjunum.

Tilsamans hevur próstadømisráðið skert nakrar 100 túsund krónur av øllum fíggjarætlanunum tilsamans, og eru tað serliga tær størru kirkjurnar, ið eru skerdar.

Men sambært dómpróstaráðnum fáa skerdu kirkj-urnar kortini ikki trupulleikar av hesum. Ráðið hevur í ongum føri skert raksturin hjá nakrari kirkju, men í staðin íløgur, sum tola at bíða til næsta ár ella seinni, siga tey í dømpróstaráðnum.

### Kalla inn til samráð

Próstadømisráðið kallar í hesum døgum tey kirkjuráð, ið hava fingið sínar fíggjarætlanir skerdar, inn til samráð.

Á hesum fundum greiðir próstadømisráðið frá orsøkunum til skerjingarnar og útlitunum fyri, nær skerdu íløgurnar kunnu koma aftur á fíggjarætlanina.

Av teimum 60 kirkjunum í Føroyum eru tríggjar, ið als ikki hava tørv á at fáa burturav samlaðu puljuni av kirkjuskatti. Her er talan um tríggjar av teimum smáu føroysku bygdakirkjunum.

Í próstadømisráðnum sita Bjarni Bæk, dómpróstur, Hákun Dam úr Klaksvík, Gunvør Dam Jensen úr Kollafirði, Edvin Joensen úr Leirvík og Eyðbjørg Mortensen av Tvøroyri. Hetta eru limir, sum eru valdir av øllum kirkjuráðunum í landinum.

Bjarni Bæk, dómpróstur, er formaður í próstadømisráðnum. Dómprósturin er sjálvsagdur limur í ráðnum, men hann er ikki sjálvskrivaður formaður.

